Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Starvsfólk til Stuðulstoymið í Suðurstreymoy

Eitt starv sum stuðul í Stuðulstoyminum í Suðurstreymoy er leyst at søkja til setan 1. august ella skjótast aftaná.

**Arbeiðið hjá stuðulstoyminum fevnir m.a. um:**

- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá brúkaranum.
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki, so sum matgerð, reingerð, klædnavaski, handilsørindum, peningaviðurskiftum og øðrum við atliti til, hvat tann einstaki brúkarin megnar.
- At vegleiða og samskipa samstarv við t.d. Almannastovuna, Økispsykiatriina, Psykiatriska Depilin og aðrar myndugleikar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:

- Kanst arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kanst átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Ert sterkur bæði til likams og sálar.
- Tú hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan psykiatriska økið.

**Vit bjóða:**

- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp

**Setanartreytir:**
Talan er um eitt fast starv innan Nærverkið við fyribils setan í Stuðulstænastuni. Roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá varadeildarleiðara Odu Jóhansdóttir og deildarleiðaranum Regin Johansen, tlf. 354020.

**Umsókn:**
Umsóknir skulu sendast til:
Stuðulstænastan
Løkjatún 1
160 Argir
Stílað: Regin Johansen

**Umsóknarfreist: 4. juni 2007.**

Stuðulstænastan

## Hjálpari til Stuðulstænastuna

Stuðulstænastan søkir eftir einum hjálpara frá 1. juli 2007 at arbeiða 30 tímar um vikuna hjá einum rørslutarnaðum manni í Tórshavn. Tann, ið settur verður, fer at arbeiða saman við øðrum hjálparum, ið arbeiða 8 tíma vaktir dag- kvøld- og náttarvaktir í eini 24-tíma vaktarskipan.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava eina viðkomandi sosiala- ella heilsufakliga útbúgving, hava fyrimun til starvið. Koyrikort krevst. Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

**Setanartreytir:**
Talan er um eitt starv innan Nærverkið við fyribils tænastustaði í Stuðulstænastuni. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Sofíu Jespersen, tlf: 354020.

**Umsókn:**
Umsókn við avrit av prógvi og upplýsing um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast til:
Nærverkið
Stuðulstænastan
Løkjatún 1, F0-160 Argir

**Umsóknarfreist: 29. mai 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Stuðulstænastan hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið. Stuðulstoymið er ein tvørfakligur starvsfólkabólkur við 2 pedagogum, 1 sjúkrarøktarfrøðingi og 2 heilsuatstøðingum og heldur til í hølunum hjá Stuðulstænastuni í Løkjatúni 1 á Argjum. Málbólkurin hjá stuðulstoyminum er heimabúgvandi fólk omanfyri 18 ár, ið hava ein skerdan sálarligan virkisførleika.
Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

## Pedagogar og hjálparfólk til Vípuna

Sjálvsognarstovnurin Vípan søkir eftir 2 pedagogum 30 tímar og 1 hjálparfólkið 25 tímar, til at byrja 15. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

Vípan er ein barnagarður við børnum frá 3-7 ár. Eftir summarfrítíðina fer Vípan at taka ímóti børnum frá 2-8 ár. Tað er fyrsta árið, Vípan fer at taka í móti frítíðarskúlabørnum og vøggustovubørnum.

Arbeiðstíðinar eru skiftandi, frá 7.30-17.00.

**Vit bjóða eitt áhugavert starv:**

- hvar náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og hvar spæl fyllir nógv
- hvar virðing og trivnaður hjá barninum er í hásætið
- opinleika og ein jaligan hugburð fyri framtíðini
- við broytingum hvar tú hevur tína ávirkan

**Vit vænta av tær:**

- At tú ert útbúgvin pedagogur
- Hevur royndir og fagliga vitan
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- At tú ert opin fyri broytingum
- At tú hevur góð samstarvsevnir yvir fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum
- At tú sært fyrimunir fram um vansar

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyð Skúvadal, leiðara á tlf 317535/ 287535

Umsókn saman við avrit av prógvum og viðmælum, skal vera stovninum í hendi, seinasta lagi 27. maj 2007.05.10

**Vípan**
Vípuvegur 3
100 Tórshavn
Tlf. 317535/ 287535

## Skrivstovustarv á Føroya Barnaheimi

Á Føroya Barnaheimi er eitt ½ tíðar skrivstovustarv leyst til setan **01.07.2007** ella skjótast tilber.

Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Tann, ið settur verður, skal hava skrivstovuútbúgving og arbeiðsroyndir innan fyri skrivstovuarbeiði. Viðkomandi má kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann **23.05.2007.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steingøta 10
100 Tórshavn

## Sankta Frans skúli bjóðar øllum foreldrum til felags foreldrafund í Sankta Frans skúla

**Týskvøldið 15. mai 2007 kl. 19.00**, skipar skúlastýrið fyri felags foreldrafundi við hesi skrá:

1. Ársfrágreiðing verður løgd fram
2. Karolina Matras, sálarfrøðingur, heldur fyrislestur um evnið: Hvussu læra børn at lesa - ymiskir hættir.
   Hvat kunnu tey vaksnu gera fyri at menna lesingina soleiðis at børnini skilja tað lisna?
   Høvið at seta spurningar
3. Ymiskt

**Sankta Frans Skúli**

## Jørð á Tvøroyri

2 1/2 gyllin í Tvørhaga og umleið 3000 m2 innangarðs

Verður selt um nóg høgt boð fæst.

**Ring tlf. 283515 ella 218310**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo